# Siðvenja, burðardygd og tøkni

# Arkitekturdagur 2009

## Skrá

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00 | Landsverk hevur opið fríggjadagin frá kl. 13.00-19.00 í móttøkuni, Tinghúsvegur 5<br>Framsýning verður bæði við aktuellum og søguligum verkætlanum hjá Landsverk |
| **Kl. 16.00** | **Reseptión í Reinsarínum**<br><br>**Formaðurin í Arkitektafelagnum Svend Sivertsen, bjóðar vælkomin**<br>**Landstýriskvinnan í mentamálum Helena Dam á Neystabø setur Arkitekturardag 2009** |
| Kl. 16.00 | Arkitekturframsýning í Reinsarínum. Hesir arkitektar luttaka: Árni Winther Arkitektar, MAP Arkitektar, Arkitektar Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, Selmar Nielsen Arkitektar, Fuglø Arkitektar, A99 Arkitektar og Kontrast Arkitektar.<br>Framsýningin er opin fríggjadagin frá kl. 16.00-19.00, leygardagin frá kl. 12.00-18.00 og sunnudagin frá kl. 14.00-18.00 |
| Kl. 16.00 | Eygleiðing, skjalfesting og viðmerking. Børn sýna fram arkitekturmyndir frá verkevnisdegnum:<br>Eygleiðing, skjalfesting og viðmerking í N. Finsensgøtu 7 (gl. Joto, við inngongdina til Býarbókasavnið)<br>Framsýningin er opin fríggjadagin frá kl. 16.00-19.00, leygardagin frá kl. 12.00-18.00 og sunnudagin frá kl. 14.00-18.00 |
| Kl. 16.00 | Foto-við-merking letur upp í (Reinsarínum)<br>Framsýningin er opin fríggjadagin frá kl. 16.00-19.00, leygardagin frá kl. 12.00-18.00 og sunnudagin frá kl. 14.00-18.00 |
| Kl. 16.00 | Jarðfeingi hevur framsýning í Reinsarínum<br>Framsýningin er opin fríggjadagin frá kl. 16.00-19.00, leygardagin frá kl. 12.00-18.00 og sunnudagin frá kl. 14.00-18.00 |

### *Altjóða arkitekturardagur 9. oktober*

9. oktober er altjóða arkitekturardagur.

Her í Føroyum verður hesin dagur hildin á fyrsta sinni.

Arkitekturardagurin er eitt tiltak sum UIA, ein altjóða felagsskapur fyri arkitektar, setti í verk í 1985.
Dagurin hevur síðan verið hildin um allan heim, á hvørjum ári.

Í ár er ælanin, á fyrsta sinni, at halda arkitekturardag í Føroyum. Tað er ætlanin, at hetta verður ein byrjan til eitt afturvendandi tiltak, á hvørjum ári, har arkitekturin verður í focus.

Altjóða yvirlýsingin hjá UIA fyri arkitekturardegnum í ár er: “architects energy versus global crisis”.

Í Føroyum eitur yvirlýsingin “Burðardygd, siðvenja og tøkni”.

Á arkitekturardegnum ynskja vit at vísa á nýggja føroyska byggilist og hvussu føroyskir arkitektar fyrihalda seg til hugtakið burðardygd.
Byggilistin er týðandi partur í samfelagsmenningini, hon tulkar tíð og stað, vísir á nýggj hugarák og nýggja tøkni.
Samstundis eru vit tilvitað um at varðveita okkara mentunararv.